# Ætla at byggja 17 íbúðir á Kambsdali

*Nú verður møguleiki hjá fólki at keypa sær eina íbúð á Kambsdali. Enn er einki tíðarmál sett á, men verður undirtøka fyri ætlanini, so fer henda loysnin at minka um bíðilistan eftir grundøkjum í Fuglafirði*



**Tey, ið hava staðið á bíðilista eftir grundøki í Fuglafirði, hava nú fingið ein nýggjan møguleika fyri at seta føtur undir egið borð.**

**Íalt er ætlanin at byggja 17 smærri og størri íbúðir á Kambsdali**

BYGGING
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** Eitt uppskot um íbúðir á Kambsdali er nú komið so mikið langt, at teir bjóða hesum fólkum og øðrum við ein møguleika at keypa eina íbúð á hesum náttúruvakra staði.

Íalt hava fólk møguleikar at velja millum fýra ymiskar støddir av lyklaklárum íbúðum, har til ber at flyta inn í, so skjótt henda ætlanin verður sett í verk.

- Nær hetta verður, ber ikki til at siga nakað um enn. Tað veldst um áhugan, sigur Ingi á Tórgarði, sum fegin letur allar upplýsingar um ætlanina, har Fuglfjarðar kommuna eisini er ein partur av.

Áðrenn farið verður víðari við ætlanini er treytin hon, at í minsta lagi sjey íbúðir verða keyptar.

Sum skilst hava fleiri longu spurt seg fyri um ætlanina, og av hesum er tann eini fyrispurningurin at rokna sum rættiliga ítøkiligur.

## FAKTA

**Dømi um íbúð**

Bruttovídd: 53 fermetrar
Kostnaður: 545.000 kr.
Útgjald 10%: 54.500 kr.
Nettogjald pr. mðr.: 3.200 kr.



### Bíðilisti

Ingi á Tórgarði sigur við Sosialin, at Fuglfjarðar kommuna hevur í løtuni ein bíðilista eftir grundøkjum, har omanfyri 50 nøvn standa á.

Herfyri sendi kommunan út brøv til hesi, har kunnað varð um hesa nýggju íbúðarætlanina. Og sum víst er á omanfyri, er líkt til at hesi brøvini hava havt sína ávirkan.

Treytin fyri at henda ætlanin kann setast í verk er kortini, at í minsta lagi sjey fólk keypa eina av íbúðunum í hesari bygginini.

Ein fyrimunur við hesi íbúðarbygginini er, at hon liggur í sera náttúruvøkrum umhvørvi, har stutt er til miðnámsskúlarnar og har stuttur teinur er til øll tilboðini, sum finnast í Fuglafirði.

### Bíligt

Hugskotið við hesi ætlanini er at skapa eitt gott og kveikjandi íbúðarumhvørvi, við trimum lonum kring eitt miðsavnandi atkomu- og uppihaldsøki.

Ætlanin fevnir sum nevnt um 17 størri og smærri íbúðir, sum eru millum 46 og 129 fermetrar til støddar. Kostnaðurin fyri hesar liggur millum 545.000 og 1.120 mió. kr.

Ein fíggingarstovnur hevur roknað út, at skal ein keypa ta bíligastu íbúðina, sum er ein 2-rúms íbúð, so er nettogjaldið 3.200 kr. um mánaðin, og fyri ta dýrastu loysnina, sum er ein 5-rúms íbúð 6.300 kr. um mánaðin, tá útgjaldið er 10%.

Miðskeiðis á økinum er ein felags hitamiðdepil, og har er eisini eitt fríøki og eitt spæliøki til børnini.

Hinvegin so hevur kommunan sjálv ætlanir um at menna tænastustøðið til borgarnar, við m.a. at leggja út økir til kommunalar stovnar, handlar og annað.